# Keyp renniskógvar



– Tú mást eisini hugsa um vektina …, segði sølumaðurin og hugdi uppá meg.
Ja, for hundan – tað er eisini tí eg ætli mær út at renna, hugsaði eg – … til dømis skulu sprintaraskógvar helst viga so lítið, sum møguligt, helt sølumaðurin fram, meðan hann vimsaði runt um eina rennimaskinu og trýsti á ymsar knøttar har inni í einum tí mest profesionella ítróttahandlinum í Keypmannahavn. Nei, sprintaraskóm hevði eg nokk heldur ikki brúk fyri beint nú. Bara einar ordiliga góðar renniskógvar og helst eitt sindur kjekkaðar, tú veit, mutlaði eg og hopaði, at hann ikki hugdi niður á gomlu jollurnar, eg var í.

anna@sosialurin.fo



*Anna Ellingsgaard*

**Úrslitið av shoppingtúrinum vóru hesir**

